# Next stop: Superligan



Andrew av Fløtum er nú einasti føroyingurin í Fremad Amager

**Johan Byrial Hansen, Jón Rói Jacobsen og Gunnar Nielsen tykjast hava beina kós móti donsku superliguni**

**Útisetar**
*Jákup Mørk*

Eftir at ein álvarsligur skaði forðaði Jón Róa Jacobsen í fyrstu roynd hansara á yrkisleiðini, gjørdi hann í fjør enn eina roynd. Hetta tá hann gjørdi sáttmála við Frem, sum spælir í næstbestu donsku deildini.

Venjari í felagnum er væl lýddi Ebbe Skovdahl, og einki er at fara skeivur í, at hesin heldur nógv av føroyska verjuleikaranum.

- Jón Rói hevur kanska verið besti leikarin hjá okkum í ár, hevur venjarin millum annað sagt, og tá talan er um Ebbe Skovdahl, so leggja donsku miðlarnir til merkis, hvat sagt verður.

Og fyrra helming av kappingini hevur nøgdsemið um avrikið hjá Skovdahl og hansara monnum eisini verið heilt gott. Tá farið varð í holt við várhálvuna, var Frem á øðrum plássi í donsku fyrstu deild, og heldur hetta plássið sær, verður uppflyting til superliguna veruleiki.

Umframt Jón Róa telur felagið eisini ein annan føroyskan leikara. Tað er Gunnar Nielsen, sum er eykamálverji hjá felagnum. Evnaríki málverjin er nú á triðja ári í Frem, og tó at hann enn ikki er komin á besta liði í veruligum dysti, so tykist tann løtan alsamt at nærkast.

## Byrial á odda

Oddaliðið í donsku fyrstu deild í vetrarsteðginum er annars AC Horsens, sum eisini hevur føroyskt íkast.

Tað er nevnliga her, at Johan Byrial Hansen seinastu árini hevur spælt. Í fjør lá liðið heilt leingi á odda í kappingini, men móti kappingarenda mistu teir tó luftina og vórðu yvirhálaðir.

Tað tykjast Johan Byrial Hansen, venjari hansara, Kent Nielsen, og hinir í felagnum tó ikki at gera í ár. Við 35 stigum vóru teir fýra stig undan Jón Róa og teimum, tá farið varð í vetrarfrí.

## Andrew einsamallur

Um framt teir báðar Frem-spælararnar, er eisini ein annar føroyingur í donsku 1. deild.

Eftir at Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør eru farnir aftur til Føroya, er Andrew av Fløtum nú einsamallur føroyingur í leguni. Hann hevur stóran part av tíðini verið fastur fúsur í álopinum hjá Fremad Amager, sum í løtuni liggur á sjeynda plássi í deildini.

Um tað so verður her, at Andrew fer at spæla alt árið, er ein onnur søga. Beint um evstamark á hesi útgávuni ljóðaði slatur um, at HB roynir at fáa leikaran heimaftur, men um tað verður veruleiki, er so ein onnur søga.

# Tungt hjá Toda

**Á sínum áttanda ári í FCK tykist Todi vera meira í útjaðaranum av liðnum, enn hann nakran tíð áður hevur verið**

**Útiseti**
*Jákup Mørk*



Todi Jónsson hevur ofta vunnið á mótgongdini, og evnini til hetta tykist hann nú aftur fáa tørv á

Tað munar lítið, at áskoðararnir støðugt hava givið til kennar, at teir vilja hava føroyingin á vøllin. Tað er Hans Backe, sum setir liðið í FCK, og hann hevur í ár givið sera lítla spælitíð til Toda Jónsson.

Ein partur av frágreiðingini er tó, at Todi – enn einaferð - hevur drigist við drúgvan skaða í vetur. Hesaferð er talan um skaða, sum hann fekk undir fyrstu venjing síni við landsliðnum, júst sum vit øll gleddu okkum til, at Føroya fremsti fótbóltsleikari nú aftur var tøkur at taka tørn fyri Føroyar.

## Høgt virdur

Júst skaðarnir hava uttan iva verið størsta forðingin hjá Toda á yrkisleið hansara, og var tað ikki fyri hesar, so kundi væl verið, at hann spældi fyri enn størri felag enn FCK, men meira enn næstan er tað so ikki vorðið til. Áhugin hevur verið til staðar, og fyri tveimum síðani var heilt nær við, men ta ferðina vildi FCK hava ov nógvar pengar fyri leikaran.

Men hóast alt hetta, so skal ikki gloymast, at Todi hóast alt hevur verið ein av mest týðandi leikarunum í FCK. Hann hevur verið besti málskjútti hjá liðnum í fleiri ár, og á all-time listanum er hann eisini leikarin, sum hevur skorað oftast fyri FCK. Hartil er hann leikarin á dagsins FCK, sum oftast hevur umboðað felagið.

Og alt hetta eru dygdir, sum áskoðararnir hava sett prís uppá. Hóast talan hevur verið um upp- og niðurgangstíðir, so hevur Todi ongantíð dult fyri, at hann er fegin fyri at spæla í FCK. Hann hevur eisini sagt, at hann fegin tekur enn eitt tørn fyri felagið, um nýggjur sáttmáli stendur honum í boði.

Men fyrst og fremst, so ræður um at spæla fyri einum nýggjum sáttmála. Tað gerst best við at skjóta mál fyri besta liðið hjá FCK, men so leingi, sum venjarin velir at nýta Santos, Zuma, Bech og Møller í álopinum, er tað ein trupul uppgáva hjá føroyska essinum. Men hinvegin, so hevur hann so ofta sýnt, at hann er maður fyri at taka torføra dystin upp, og hvør veit, um hann ikki ger tað einaferð enn.

# Føroyskir skarprættarar

**Bæði John Petersen og Christian Lamhauge Holst verða sæddir sum menninir, ið skulu skjóta ávíkavist Holstebro og Lyngby uppeftir á stigatalvuni**

**útisetar**
*Jákup Mørk*

John Petersen flutti í fjør av landinum, og samstundis boðaði hann frá, at hann allar helst hevði leikt sín seinasta landsdyst.

Hvussu tað fór at verða við fótbóltinum, tá hann flutti til Danmarkar, segði hann vera rættiliga óvist, men tað gekk tó ikki long tíð, áðrenn hann spakuliga kom ígongd. Einar tvær vikur vandi hann við besta hópinum hjá superligu-felagnum í Viborg, men her spurdist so ikki sáttmáli burturúr.

Tað gjørdi tað tó í januar mánaði. Tá var John farin at tosa við tey í Holstebro Boldklub – HB – sum hevur lið í triðbestu donsku røðini.

Sáttmáli spurdist burturúr, og í venjingardystunum hevur John í øllum førum staðið seg væl. Í felagnum verður hann lýstur sum ein kropsliga sterkur álopsspælari, sum hevur góð evni at taka lut í uppbyggjandi spælinum, og júst hesar dygdirnar munnu eisini vera tær, sum flestu føroyingar seta í samband við skálamannin. At máltevið eisini framhaldandi er gott, hevur hann longu staðfest í venjingardystunum, har hann hevur verið greður toppskjútti hjá liðnum.

Og hesum hevur HB helst eisini tørv á. Felagið skal í vár stríðast fyri at koma úr niðurflytingarvandanum, sum teir hava verið í størsta partin av árinum.

## Føroyskur toppskjútti

Hjá Christian Holst Lamhauge stendur í so máta nakað betri til.

Lyngby, har hálvi føroyingurin er fastur partur av álopinum, var í vetrarsteðginum á einum sætta plássi. Bert tvey stig frá uppflyting.

Og her hevur Christian veruliga gjørt um seg seinasta hálva árið. Í vetur varð hann av mótleikarum í deildini kosin sum ársins profilur í deildini, og einki er at ivast í, at tey í Lyngby eru fegin um, at tað eydnast at leingja sáttmála hansara. Christian Lamhauge Holste er við 13 málum nevnliga toppskjútti í deildini.